

*Teir tíggju einsamøllu menninir skulu í sendingunum royna at gera sítt til, at kvinnurnar á oynni gloyma alt um makar sínar*

# Tey verða leidd í freistingar

**Sonevndu reality-sendingarnar eru seinnu árini vorðnar alt meira umtóktar. Baren, Big-brother og ikki at gloyma Robinson hava gjørt vanlig fólk landskend, og viku eftir viku hava hyggjararnir sitið kleindir at skíggjanum, til tess at fylgja við, hvussu leikur ferð**

Trætan og skeldan eru gerandiskostur, tá fólk, sum kanska at byrja við als ikki kenna hvønn annan, í viku- ella mánaðarvís skulu liva tætt uppat hvørjum øðrum, og sjónvarpsliðini munnu ikki vera ótilvitað um, hvussu samansetingin av bólkunum er, tá upptøkurnar byrja.

Temptation Island, sum nú verður víst á TVDanmark er ein av hesum sendirøðum, og her er endamálið at royna, hvussu sterkur kærleikin er. Fýra norðurlendsk pør verða send til vøkru teilendsku oynna, Koh Samui, har tey hitta 21 »singlur«. Hereftir vera pørini býtt sundur, soleiðis at menn og kvinnur liva hvør sær, og so byrja freistingarnar.

Í 14 dagar verða nú einsamøllu makarnir frestaði við eittans endamáli. Nevnliga at tey skulu verða maka sínum ótrúgv. Tað skal leggjast afturat, at tey fýra pørini sjálvboðin eru við í sendingini, og at tey við hesum ætla sær at prógva, at tey ikki eru ótrúgv, hóast møguleikin er til tess. Góðir døgurðar við livandi ljósi og tónleiki, veitslur við svimjihylin, gongutúrar á strondini. Alt tað, sum vanliga verður roknað sum romantikkur og stuttleiki er á skránni, og tað er ikki heilt frítt, at freistingarnar til tíðir hava lyndi at gerast ov stórar og møtumiklar.

Sum síður er í reality-sendingunum, so eru tað ikki allir luttakararnir, sum sleppa at liva alla senditíðina. Tað eru nevnliga bert tey, sum eru væl dámd av hinum kyninum, sum sleppa at halda fram. Ein fyri og annar eftir verða luttakararnir offur í atkvøðugreiðslunum, og so hvørt sum tey mest dámligu gerast færri og færri, verður intimiteturin millum pørini og tey eftirverandi størri.

Pørini, sum eru við í ársins útgávu av Temptation Island er donsku Héléne & Allondo úr Keypmannahavn, norsku Eilen & Alexander úr Oslo, og so tey bæði svensku pørini. Tobias & Emma úr Sundsvall og Jerry & Olivia úr Malmø.

Hvussu sterkur kærleiki teirra er, fæst at vita mikukvøld, tá sendingin er fastur táttur.